**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1236**
**Tíðarskeið 05/10-10/10-2011**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Ebba Mortensen og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir standardskurðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu og WP2-glúpur.

**Um túrin:** Vit fóru út mikudagin 5/10 kl. 2110. Siglt varð suður á støð S1, har vit byrjaðu skurðin og tóku støðirnar móti Hetlandi. Tá liðugt var at taka støðir á skurði S, sigldu vit norður á støð E8, og tóku hendan skurðin inn móti Nólsoy. Eftir hendan skurðin varð siglt eystur á støð N1, har vit tóku skurð N norður á 64°30N og 6°00V. Haðani sigldu vit í ein útsynning á støð R8, har vit tóku skurðin inn móti Mykinesi, og so skurð M út frá aftur, út í Bankarennuna. Síðani sigldu vit út á NWFC, har vit tóku eina CTD støð. Hetta var ein eykastøð.
Siglt var so út á Føroyabanka, har vit byrjaðu við V10 og tóku skurðin inn móti Trøllhøvda. Liðugt var at taka skurðin 10/10 kl. 1045.
Alt riggaði, sum tað skuldi, og alt gekk væl, hóast veðrið var vánaligt onkran dag á túrinum.
Vit vóru aftur á Havnini mikudagin 10/10 kl. 1300.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 77 støðir og saltprøvar á 50 støðum. Við glúpinum tóku vit 41 støðir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í vetur.

**Viðmerkingar:** Á hesum túrinum vórðu fleiri eykastøðir tiknar. Hesar støðir koma framyvir at vera fastur partur av standardskurðunum. Talan er um hesar støðir:

- 10 eykastøðir innast á skurði V, fimm millum støð V1 og V2, og fimm millum støð V2 og V3.
- 6 støðir í ein útsynning úr Mykinesi (skurður M) og 8 støðir í ein útnyrðing úr Mykinesi (skurður R).
- 3 eykastøðir innast á skurði N og 7 innast á skurði E.

19-10-2012 ________________________
Regin Kristiansen

Vend




Støðir og kósir á túri 1236.